Hanna D. Andreassen

Fra: Malene Egeberg Jacobsen
Sendt: Friday, October 27, 2023 16:50
Til: Barna- og Útbúgvingar Málaráðið
Emne: Lóg um Kervi+, mál nr. 23/03209

Vísandi til niðanfyri standandi hoyringsumbøn skal Umhvørvisstovan viðmerkja fylgjandi:

Til § 2, stk. 5 um flyting av upplýsingum:

Ásett verður, at Undirvísingarstýrið hevur heimild at heinta upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum og útflýggja upplýsingarnar umvegis Kervi+. Sum upplýst í viðmerkingunum hava almennir myndugleikar longu heimild sbrt. lóg um fólkayvirlit at útvega sær upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum, um tað er neyðugt. Ein treyt er, at upplýsingarnar verða viðgjørdar í samsvari við dátuverndarlógini. Hetta merkir millum annað, at upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum ikki skal fevna um fleiri persónar ella fleiri upplýsingar um persónarnar enn neyðugt er í mun til ítøkiligu uppgávuna.

§ 31, stk. 1 í lóg um fólkayvirlit ásetir, at almennir myndugleikar einans hava heimild at lata upplýsingar undir hesum vard nøvn og bústaðir úr Landsfólkayvirlitinum víðari til aðrar myndugleikar ella privat, tá hetta er heimilað í lóg ella við loyvi frá Innlendismálaráðnum (nú Løgmálaráðnum). Ásetingin hevur til endamáls at tryggja, at persónar og myndugleikar, ið hava tørv á tí, útvega sær vanligar persónupplýsingar beinleiðis úr Landsfólkayvirlitinum. Hetta er trygd fyri, at upplýsingarnar altíð eru dagførdar og rættar, og at reglan um navna- og bústaðarvernd ikki verður sett til viks. Verða upplýsingarnar latnar øðrum í greiðum samsvari við lóg ella tí Innlendismálaráðið (Løgmálaráðið) hevur givið loyvi til tess, hevur málaráðið frammanundan havt møguleika at greiða frá síni støðu.

Ein myndugleiki, ið fær upplýsingar um vard nøvn og bústaðir, skal sbrt. § 31, stk. 2 í lóg um fólkayvirlit viðgera tær soleiðis, at privat ikki fáa atgongd til hesar. Herumframt skal myndugleikin í øllum førum, tá ið ræður um nøvn og bústaðir, skráseta, at upplýsingarnar eru vardar. Verða vardar navna- og bústaðarupplýsingar latnar víðari eigur altíð samstundis at verða boðað frá, at upplýsingarnar eru vardar.

Vísandi til omanfyri standandi eigur uppskot til løgtingslóg um Kervi+ greitt at áseta í hvørjum støðum, til hvat endamál og undir hvørjum umstøðum Undirvísingarstýrið hevur heimild at útflýggja upplýsingar umvegis Kervi+.

Umhvørvisstovan hevur annars ikki viðmerkingar til lógaruppskotið.

Vinaliga

Malene Egeberg Jacobsen
Umhvørvisstovan
Varastjóri

Postboks 2048,
FO-165 Argir, Føroyar
tlf.: +298 342400
email: malenaj@us.fo
web: www.us.fo

Hugsa um umhvørvið áðrenn hesin t-postur verður skrivaður út
Think about the environment before printing this email

Fra: Hanna D. Andreassen <hanna@bumr.fo>
Sendt: 10. oktober 2023 15:15
Til: uvs@uvs.fo; Nám <nam@nam.fo>; Postur til Hagstovuna <Postur@hagstova.fo>; setur@setur.fo; Dátueftirlitið <dat@dat.fo>; Yrkisdepilin <yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo>; heilsuskulin@skulin.fo; us <us@us.fo>; Familjufyrisitingin <famf@famf.fo>; lararaf@lararafelag.fo; Føroya Pedagogfelag <pedagog@pedagogfelag.fo>; nielsj@vh.fo; jorginv@tsk.fo; yf@yf.fo; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>
Cc: Elsa Østergaard <elsao@bumr.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um Kervi+ til hoyringar - Freist 27. oktober 2023

Góðu tit

Viðhefta mál verður við hesum sent tykkum til hoyringar við freist **fríggjadagin 27. oktober 2023**.

Endamálið við lógaruppskotinum er at áseta yvirskipaðu rammurnar fyri nýtslu av upplýsingum úr Kervi+, og at áseta heimildir til at umsita Kervi+, samstundis sum Kervi+ við lógini verður viðurkent sum almenna talgilda lestrarfyrisitingarskipanin í Føroyum.

Møguligar viðmerkingar skulu sendast til bumr@bumr.fo , við tilskilan ***« Lóg um Kervi+, málnr. 23/03209»***

Eru spurningar til omanfyri standandi, ber til at venda sær til Elsu Østergaard, deildarstjóra, tlf. 555004

Hoyringarpartar:

Undirvísingarstýrið

Nám

Hagstovan

Fróðskaparsetur Føroya

Dátueftirlitið

Yrkisdepilin

Heilsuskúlin

Landsfólkayvirlitið

Familjufyrisitingin

Føroya Lærarafelag

Føroya Pedagogfelag

Maritimir lærarar í Føroyum

Føroya Tekniska Lærarafelag

Yrkisfelagið Miðnám.

Øll aðalráð

Vinarliga / Kind regards

Hanna D. Andreassen
Stjórnarskrivari / Personal Secretary

Office: +298 306500
Mobile: +298 555060
Mail: hanna@bumr.fo

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children and Education

J. H. Schrøtersgøta 7
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

www.bumr.fo